# Eivør hevði hóskað væl á Radio 2



Sara Leathem, sum er A&R skóti fyri plátufelagið Red Ink, ið er ein partur av Sony BMG konsernini, var eitt av teimum nógvu fólkunum úr tónleikaídnaðinum, ið vitjaðu á Funky Faroe Islands í London. Sara hevði sætt Teitur fleiri ferð áður, og henni dámdi væl Teit. Men orsøkin til hennara luttøku á Funky Faroe Islands var Eivør Pálsdóttir, ið hon var komin fyri at uppliva. Arbeiðið hjá Saru er at finna nýggj nøvn, og gera útgávusáttmála við tey. Red Ink snýr seg nógv um at finna nýggj talentir og geva tey út.

– Eivør var sera góð, segði Sara við planet.fo og helt fram

– Hon hevur eina fantastiska rødd. Okkurt av løgunum, kundi eg ímyndað mær, hevði riggað væl á Radio 2. Radio 2 er ein stór ensk útvarpsstøð, ið vendir sær til ein vaksnan lurtaraskara.

**nud**



Sara Leathem finnur nýggj nøvn til plátufelagið Red Ink, ið er partur av Sony BMG

mynd: nud

## HITLIST

### 15 tær bestu — ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew | Igen & Igen & |
| 2 | The Dreams | Sasa Sa, Sa |
| 3 | Eb/Streymur | E/B Streyma Sangurin |
| 4 | Týr | Wings Of Time |
| 5 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 6 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 7 | Marius | The Sky Is Our Home |
| 8 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 9 | Scissor Sisters | I Don´t Feel Like Dancin' |
| 10 | Jokeren ft. L.O.C & Niarn | Gravøl |
| 11 | Rihanna | Unfaithful |
| 12 | Teitur | Hitchiker |
| 13 | Meat Loaf ft. Marion Raven | It's All Coming Back To Me Now |
| 14 | Muse | Starlight |
| 15 | Fergie | London Bridge (Oh Shit) |

### Eykaløg

| | |
|---|---|
| U2 & Green Day | The Saints are |
| Nik & Jay | När Et Lys Slukkes |
| Nelly Furtado | Say It Right |
| Ying Yang Twins ft. Wyclef Jean | Dangerous |
| The Dreams | Nummar |

### Tjeklisten — DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew / Igen & Igen & | |
| 2 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 3 | Kashmir | Kalifornia |
| 4 | Nik & Jay | När Et Lys Slukkes |
| 5 | Muse | Starlight |
| 6 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 7 | Oh No Ono | Practical Money Skills For Life |
| 8 | Jokeren ft. L.O.C & Niarn | Gravøl |
| 9 | Basshunter | Boten Anna |
| 10 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 11 | James Morrison | Wonderfull World |
| 12 | Alphabeat | Fascination |
| 13 | Killers | When We Were Young |
| 14 | Nelly Furtado ft. Timbaland | Promiscious |
| 15 | TV2 ft. Anne-Stine | Kontoret Lukker Nu |
| 16 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 17 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 18 | Nordstrøm | Gi' Besked |
| 19 | Rasmus Nøhr | Lykkelig Smutning |
| 20 | Magtens Korridorer | Sara Har |

### Top of the Pops — BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 2 | Razorlight | America |
| 3 | Bob Sinclair & Cutee B | Rock This Party (Everybody Dance Now) |
| 4 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 5 | Girls Aloud | Something Kinda Ooooh |
| 6 | Meat Loaf ft. Marion Raven | It's All Coming Back To Me Now |
| 7 | P. Diddy ft. Nicole Scherzinger | Come To Me |
| 8 | James Morrison | Wonderfull World |
| 9 | Lil' Chris | Checkin' It Out |
| 10 | Ordinary Boys | Lonely At The Top |
| 11 | Beatfreakz | Superfreak |
| 12 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 13 | Jamie T | If You Got The Money |
| 14 | Beyonce | Irreplaceable |
| 15 | Nelly Furtado ft. Timbaland | Promiscious |
| 16 | The Killers | When You Were Young |
| 17 | Shakira ft. Wycleaf Jean | Hips Don't Lie |
| 18 | Lily Allen | LDN |
| 19 | Amy Winehouse | Rehab |
| 20 | Snow Patrol | Chasing Cars |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ludacris ft. Pharrell | Money Maker |
| 2 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 3 | Hinder | Lips Of An Angel |
| 4 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 5 | The Fray | How To Save A Life |
| 6 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 7 | JoJo | Too Little Too Late |
| 8 | Justin Timberake ft. T.I. | My Love |
| 9 | Young Jibbs | Chain Hang Low |
| 10 | Nickelback | Far Away |
| 11 | Weird Al Yankovic | White & Nerdy |
| 12 | Danity Kane | Show Stopper |
| 13 | Evanescence | Call Me When You're Sober |
| 14 | Chris Brown | Say Goodbye |
| 15 | Fergie | London Bridge |
| 16 | Nelly Furtado | Maneater |
| 17 | Chingy ft. Tyrese | Pullin' Me Back |
| 18 | P. Diddy ft. Nicole Scherzinger | Come To Me |
| 19 | The Pussycat Dolls ft. Snoop Dogg | Buttons |
| 20 | Ciara ft. Chamillionaire | Get Up |

sound

# SAMRÁÐAST VIÐ MTV UM G!FESTIVALIN



**Íslendska Anna Hildur Hildibrandsdóttir hevur syrgt fyri, at MTV sendir av Iceland Airwaves. Í næstum fer hon undir at royna at fáa heimsins størstu tónleikarás á G!Festivalin.**

FUNKY FAROE ISLANDS
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

- Um vit skuldu sent frá einum føroyskum festivali, so má hesin vera áhugaverdur fyri okkum. Hetta merkir, at okkurt av nøvnunum fellir inn í karmarnar fyri, hvat vit halda vera áhugavert. Tónleikaprofilurin skal vera rættur og nøvnini nóg stór, sigur David Ridings Senior Brand Manager á MTV2, VH2 og MTV Dance.

Føroyska ferðaliðið á Funky Faroe Islands tiltakinum í London vitjaði hølini hjá MTV. Har hittu vit David Ridings. Hann er ein av monnunum aftan fyri avgerðina hjá MTV at senda frá Iceland Airwaves. Hann varð tí spurdur, hvat skuldi til, fyri at MTV kom á ein av føroysku festivalunum.

David Riding var als ikki avvísandi fyri hugskotinum og vísti á, at MTV er farið undir fleiri nýggjar rásir eitt nú MTV Flux og MTV Overdrive, rásir, ið geva hyggjaranum nógv størri møguleika fyri at luttaka í sendiskránni. Eitt nú at gera innsløg frá festivalum og tiltøkum. Her kundu føroysku festivalarnir verið líka áhugaverdir sum allir aðrir festivalar, helt David Ridings

Íslendska umboðskvinnan hjá Iceland Airwaves í London Anna Hildur Hildibrandsdóttir, hevur fingið avtaluni hjá Airwaves við MTV í lag. Anna Hildur hevði ábyrgdina fyri tónleikapartinum av Funky Faroe Islands, og hon skipaði somuleiðis fyri vitjanini á MTV. Anna Hildur greiddi frá, at hon í næstum fer at tosa við MTV um G!Festivalin. Men hon vísti á, at skuldi MTV vera áhuga, máttu stórir partar av skránnið fyri festivalin liggja klárir longu í desember. Tí tá fer MTV undir at leggja ætlanir fyri komandi ár.

David Ridings vísti okkum runt í hølunum hjá evropeisku útgávuni av heimsins størstu tónleikasjónvarpsrás. Har sótu fólk sum fingust við nógvar ymiskar útgávur av MTV á nógvum ymiskum málum.

Í niðaru hæddini vóru upptøkuhøli og kantina, meðan øll ovara hæddin var eitt skrivstovulandslag. Har sótu fleiri hundrað fólk við síni skrivaraborð, ferðin var høg á hesum arbeiðsplássinum, og fólk gekk skjótt framvið okkum. Í einum króki funnu við framleiðaran á sendingini Gonzo, ið er ein av teimum best umtóktu sendingunum á MTV2. Vit hittu hann uttan fyri eitt evarska lítið upptøkuhølið einar 10 fermetrar ella so, og fingu at vita, at hetta er upptøkuhølið har Gonzo verður tikið upp. Framleiðarin Dani hevði skund, tí hann eina løtu seinni skuldi í upptøkuhølið við Gonzo vertinum Zane Lowe, at taka sendingina hesa vikuna upp, og áðrenn hetta skuldi hann læra seg at brúka eitt nýtt filmtól, ið hann hevði fingið stungið í hondina. Men hann steðgaði alíkavæl á og greiddi okkum frá, at tá teir gera Gonzo taka upptøkurnar vanliga hálvan annan tíma, meðan klippingin tekur tveir dagar.

Á veg út góvu føroysku umboðini David Ridings nógvar ymiskar føroyskar fløgur.